# Um intelligens



sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG
RÁÐGEVING

# Klókskapur vs. intelligens

- Hvør er munurin á at vera klókur og intelligentur?
- Nakar eitt boð?
- Tosi líka saman tvey og tvey

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Klókskapur

- Klókskapur: Tann vitan og førleikar, man hevur
- Intelligensur: Evnini at savna inn og gagnnýta vitanina
- Man verður klókari av at lesa eina bók, men ikki meira intelligentur
- Høgur intelligensur gevur fortreytir fyri at gerast klókur, men tað er neyðugt at lesa, læra og skapa royndir fyrst

# Hvat er intelligensur?

- Orðið intelligensur merkir (beinleiðis umsett) evnini at skilja, fanga og fata
- Heilin hevur einastandandi evni at tilogna sær nýggja vitan, gera niðurstøður, hugsa abstrakt, seta orð á og nýta vitan til at loysa avbjóðingar



# Søguligt perspektiv



- Fyrsta intelligenskanningin varð gjørd av Alfred Binet fyrst í 1900
- Franska Undirvísingarstýrið bað um eina kanning, so til bar at skyna millum normaltfungerandi og børn við skerdum førleikum í samband við skúlagongd
- Tólið varpaði ljós á persónligu førleikarnar hjá næmingunum, og Binet sá tað sum týdningarmikið fyri at betra um korini hjá vanligum menniskjum og geva teimum møguleika fyri sosialari uppgongu

# ‘g’ og intelligensur

- Intelligensur er ein generellur mentalur førleiki
- Man tosar um g-faktorin, sum verður umsettur til intelligenskvotient (IK)
- Intelligensurin handlar um førleikarnar at hugsa, læra nýtt, leggja ætlanir, finna loysnir og at sameina fakta
- Ílegurnar hava týðandi leiklut – 50-70 % í mun til generella intelligensin
- Tó so – umhvørvið spælir eisini inn

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Ymiskir førleikar

- Mest nýtta útgangsstøði fyri intelligenskanningum:
  - Flótandi ræsonnering: At hugsa skjótt á fleiri løgum samstundis og loysa nýggjar avbjóðingar. Relativt óheft av mentan og skúlagongd
  - Krystalliseraðir førleikar: Vitan, mál og aðrir tilognaðir førleikar. Bundið at persónsmensku, motivatión, útbúgvingarmøguleikum o.s.fr.

# Ymisku intelligensarnir

- Howard Gardner segði, at intelligensur ikki er ein eginleiki, men nógvir
- Tankin var, at øll eru dugnalig til okkurt
- Kanningar vístu, at bert summi heilaøki vóru ávirkað
- 'g' faktorurin er meira fundamentalur
- Teir ymisku intelligensarnir hjálpt í mun til at finna styrkir, læringsstílar og seta inn, har tað er viðkomandi



# Hví máta intelligens?

- Intelligensur er ikki einasta fortreyt, vit hava við okkum, men ávirkar møguleikarnar at eydnast í skúlanum
- Skúlaskipanin setur høg krøv til teoretiska innlæring, og næmingar, ið hava ilt við teoretiska hugsan, hava lægri innlæringskurvu
- Fyri at fáa góð próvtøl í praktisku fakunum, er neyðugt eisini at megna teoretiska partin

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Og hvat er endamálið?

- Intelligenskanningar geva eitt innlit í, hvussu individið gagnnýtir sítt intellekt
- Førleikakanningar vísa á styrkir og avbjóðingar og stuðla undir námsfrøðiligu raðfestingunum á stovni og í skúla
- Intelligenskvotienturin er ein týðandi forsøgn fyri fleiri av lívsins viðurskiftum:
  - Skúlagongd
  - Akademiskum førleikum
  - Inntøkustøði

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Lógarkrav

- Skúlasálarfrøðiliga kanningin gjørdist í 1949 lógarkrav, um barn skuldi í sertilboð
- Wechsler menti eina kanning í 1939. Hetta var ein hin fyrsta at lýsa ymiskar individuellar førleikar, heldur enn eitt generelt støði
- Í 1974 kom donsk versión av Wechsler
- Var betri egnað sum námsfrøðiligt tól til at meta um fortreytirnar hjá børnum at klára seg í skúlanum og samfelagnum í síni heild

sernám

NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Førleikakanning

- Ein intelligenskanning er ein sonevnd førleikakanning við ymiskum uppgávum
- Wechsler skalarnir eru í dag mest nýttu kanningartólini:
  - WPPSI: 2-7 ár – Wechsler Preschool and Primary Scale of Intelligence
  - WISC: 6-16 ár – Wechsler Intelligence Scale for Children
  - WAIS: 16 ár og eldri – Wechsler Adult Intellicense Scale
- WISC verður í høvuðsheitum nýtt til skúlanæmingar

# Álítandi?

- Kognitivar kanningar ákærdar fyri ikki at vera álítandi
- Skepsis móti úrslitunum
- Væl granskað økið, sum hevur staðfest, at úrslitini eru eftirfarandi
- Um man stóð seg væl í einum slagi av kognitivari kanning, megnaði man eisini aðrar intelligenskanningar væl – hóast hesar tóku útgangsstøði í heilt øðrum førleikum

# WISC-V

- Í kanningini eru 10 lutroyndir og 5 eykaroyndir. Hon fevnir um fimm øki: Málsliga fatan, visuo-spatiala fatan, ræsonnering, arbeiðsminnið og arbeiðsskjótleika
- Kanningin fevnir breitt
  - Summar royndir eru munnligar og lýsa orðfatan ella vitan um ymisk evni
  - Aðrar eru visuellar, har endamálið er at tulka mynstur og finna samanhangir millum myndir
  - Summar eru tíðaravmarkaðar, og aðrar kanna minnið
- Førleikakanningin lýsir, hvussu ein avrikar undir optimalum viðurskiftum. Kvalitativu inntrykkini hava stóran týdning

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Normalfordeiling

- Statistiskt er IK, mált við einari WISC, eitt gott mát fyri 'g'.
- Talan er um normalfordeiling, tá flest úrslit liggja í miðjuni og relativt fá úti í síðunum
- Intellektuella støðið millum íbúgvar er normalfordeilt um eitt miðalvirði á 100 – meðan hini virðini eru deild út við standardfrávikum á 15

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Bell kurvan




sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Javnir profilar

**Indeks- og IK-profil**




***Bemærk.*** Lodrette søjler repræsenterer konfidensintervaller

# Ójavnir profilar




***Bemærk.*** Lodrette søjler repræsenterer konfidensintervaller

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Hvat nýta vit úrslitini til?

- Førleikakanningin verður bæði nýtt til:
  - At kanna um børn eru kognitivt aldurssvarandi ella hava niðursettar kognitivar førleikar
  - At staðfesta kognitiv styrki- og vandaøki
  - At málrætta námsfrøðiliga innsatsin út frá kognitivu profilunum
  - At økja um úrtøkuna í mun til skúlagongdina

# Niðursettir kognitivir førleikar

- Normaløkið fevnir um IK millum 85-115
- Førleikastovur og sertilboð eru ofta í samband við børn við IK millum 84-70
- Børn við IK undir 70 hava lættari skerdar kognitivar førleikar. Hesi ganga ofta í sertilboðum og (í meginøkinum) ofta í Skúlanum á Trøðni
- Neyðugt at tillaga undirvísingina og seta smá realistisk mál

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Menningarmøguleikar




sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Førleikar og fortreytir

- Allir næmingar hava ikki somu fortreytir, men øll eiga at hava møguleika at menna seg so gott sum gjørligt út frá egnum fortreytum
- Hetta er ein stór og trupul uppgáva – ikki minst tí skipanirnar ofta leggja upp til, at næmingarnir eru meira eins, enn teir eru
- Tí er ofta neyðugt við serligum og tillagaðum læruplanum og krøvum

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Økir í intelligenskanningini og týdningurin av hesum í skúlahøpi

Tórfríð Arnfríðardóttir
Danielsen, sálarfrøðingur

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

## IK Hele skalaen

**Verbal Forståelses Indeks (VFI)**
- Ligheder
- Ordforråd
- *Information*
- *Verbal ræsonnering*

**Visuo-spatialt Indeks (VSI)**
- Blokmønstre
- *Visuelle puslespil*

**Ræsonnerings Indeks (RSI)**
- Matricer
- Figurvægte
- *Regning*

**Arbejdshukommelses Indeks (AHI)**
- Talspændvidde
- *Visuel genkendelse*
- *Tal-bogstav rangordning*

**Forarbejdnings-hastigheds Indeks (FHI)**
- Kodning
- *Figursøgning*
- *Udstregning*

## Primære indekser

**Verbal Forståelses Indeks (VFI)**
- Ligheder
- Ordforråd

**Visuo-spatialt Indeks (VSI)**
- Blokmønstre
- Visuelle puslespil

**Ræsonnerings Indeks (RSI)**
- Matricer
- Figurvægte

**Arbejds-hukommelses Indeks (AHI)**
- Talspændvidde
- Visuel genkendelse

**Forarbejdnings-hastigheds Indeks (FHI)**
- Kodning
- Figursøgning

## Sekundære indekser

**Kvantitativt Indeks (KVI)**
- Figurvægte
- Regning

**Auditiv Arbejds-hukommelses Indeks (AAI)**
- Talspændvidde
- Tal-bogstav rangordning

**Visuel Kognitions Indeks (VKI)**
- Blokmønstre
- Visuelle puslespil
- Matricer
- Figurvægte
- Visuel genkendelse
- Kodning

**Generel Færdig-heds Indeks (GFI)**
- Ligheder
- Ordforråd
- Blokmønstre
- Matricer
- Figurvægte

**Kognitiv Effektivitets Indeks (KEI)**
- Talspændvidde
- Visuel genkendelse
- Kodning
- Figursøgning




sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG
RÁÐGEVING

| | | | |
|---|---|---|---|
| | VFI: málslig fatan → | - Greiða frá orðum og samanhangum<br>- Hugsa abstrakt<br>- Heinta vitan í langtíðarminninum<br>- Vavi av almennari vitan |  |
| | VSI: visuo-spatial → | - Analysera og syntesa<br>- Integrera smálutir og heild, út frá visuellum tilfari<br>- Setir krøv til arbeiðsminni |  |
| **HIK: samlaða støði** | RSI: ræsonnering → | - Logiskir førleikar,<br>- Fakta-basera problemloysn<br>- Analysera smálutir í mun til heild<br>- Setir krøv til arbeiðsminni |  |
| | AHI: arbeiðsminni → | - Fata, varðveita og viðgera einfaldar visuellar og audiotivar upplýsingar í arbeiðsminninum<br>- Krevur hugsavning, uppmerksemi og mentalt tamarhald |  |
| | FHI: arbeiðsskjótleiki → | - Uppmerksom og avlesa skjótt, gera mun á og seta í raðfylgju visuel stimuli<br>- Arbeiða skjótt<br>- Eyga-hond koordinatión |  |

# Bókavørðurin (málslig fatan)

- **Effektivi bókavørðurin** nýtir vitanina breitt og viðkomandi fyri problemloysn. Hevur sett alt í system, og hevur góða leitiskipan.
- **Tann óeffektivi bókavørðurin** kann nýta vitanina á misvísandi ella lítið viðkomandi hátt, ið ikki hjálpir problemloysingini. Hann finnur ikki bøkurnar aftur, gloymir hvørjar hann eigur, og hevur ikki ans fyri, hvat hoyrir til hvat.
- Lær næmingin strategiir at leita sær fram vitan (hvar og hvussu)
- At arbeiða skipað og stig fyri stig
- At spyrja, um hann/hon ikki skilur.
- **Tey vaksnu:** tryggja tykkum, at barni skilur orðini og samanhangirnar, ið tit ynskja,

at tað skal skilja.

- Petta tann størra samanhangin sundur í minni bitar.
- Lat barni **fáa tíð** til at sodna tað, tað hoyrir. Brúka visuelt stuðlandi amboð.



sernám

NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Dømi uppá málsliga fatan (bókavørðurin)

- Hvat merkir “torskilt”, “tvørturum” og “at kína”.

- Abstrakt hugsan: Hvat hava tey til felags? “tikari og fílur”, “sól og máni”

- Almen vitan: Hví er tað dagur í Føroyum, meðan tað er nátt í Australien? Hvussu nógvir millimetrar eru í einum metri?

# Arkitekturin (visuo-spatialt)

- Dugnaligur til geometrisk design og rúmlig viðurskifti.
- Dugir at síggja, hvussu ymiskt hóskar saman – visuel ímyndingarevni.
- **Effektivi arkitekturin** teknar rætta strukturin, nýtir rætt tilfar og fær bygningin at harmonera.
- **Tann ineffektivi arkitekturin** ger skitsur, sum ikki hóska til tað, bygningurin skal nýtast til, fær ikki smálutirnir at passa saman, og hevur ikki eitt nøktandi yvirblik.




sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Arkitekturin (visuo-spatialt)

- Knýt tað bókliga saman við tí praktiska.
- Arbeið við praktiskum og hondgrípiligum tilfari.
- Arbeið við rúmligum tilfari. Brúka náttúruna og bygningin.
- Hav fleiri aktivitetir innan sama evni.
- Ger tað stuttligt og viðkomandi fyri barni.
- Dvøl við smálutir og knýt tað saman við heildini.



# Detektivurin (ræsonnering)

- **Tann góði detektivurin** veit, hvørjum smálutum, hann skal hyggja eftir, og hvussu kann skal seta tað saman við heildini. Skapa meining og samanhang. At gjøgnumskoða nýggj mynstur, hugsa logiskt, loysa avbjóðingar kreativt og koma til relevantar niðurstøður.

- **Tann óeffektivi detektivurin** gloymir at gagnýta sína vitan, hevur ringt við at raðfesta og sær ikki scenariðini fyri sær. Ringt við at skapa meining og samanhang.



# "Figurvægte" – dømi uppá ræsonnering (logiskir førleikar - detektivurin)



# Sjongulørurin (arbeiðsminni)

- **Tann effektivi sjongulørurin** hevur yvirlit, fastheldur bert informatión, sum er viðkomandi. Heldur fokus og mentalt kontrol, inntil uppgávan er loyst ella skilt.
- **Tann óeffektivi sjongulørurin** missir seg burtur í smálutum, klárar illa at navigera í informatiónum, arbeiðir seint, og megnar bert fáar informatiónir í senn.



# Dømi uppá hjálpiamboð til arbeiðsminni




sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Kassadaman (arbeiðsskjótleiki)

- **Tann effektiva kassadaman** arbeiðir skjótt og neyvt, sær detaljur, leggur merki til feilir og rættar so hvørt. Heldur eitt gott tempo.
- **Tann óeffektiva kassadaman** arbeiðir seint, men roynir at skunda sær, yvirsær, slær vørurnar skeivt inn og ger feilir. Gerst móð.



**Ráð:**

- Gev barninum tíð
- Lær barnið eitt gott arbeiðslag
- Ven tað sama umaftur og umaftur
- Vek barnið og halt tað “vakið” (út í fríska luft, nokk at drekka/eta, gev brain-breaks)
- Góðtak, at barnið ikki megnar at arbeiða skjótari enn eitt vist. Ikki stressa barnið.
- Hugsa um kvalitet, heldur enn kvantitet

# HIK vs. indeks

- SAMLAÐI INTELLIGENSURIN ER **ØLL KAKAN**



- INDEKSINI ERU SUM INGREDIENSURNAR



# HIK vs. indeks

- Økini/indeksini eru ein kunstig uppdeiling av førleikum, sum í dagliga lívinum eru samantvinnaði.
- Tó eitt gott amboð at meta um styrkir og avbjóðingar. Profilurin kann kasta ljós á, hvar barni skal kompenserast fyri í frálæraruni, og hvar menningarmøguleikarnir serliga liggja.
- HIK sigur nakað um generella kognitiva støði.
- HIK, um tað verður einasta mát, ið verður brúkt, kann tó fjala yvir styrkir og veikleikar, og sigur ov lítið um, hvussu barni kann mennast framhaldandi.

## Primær resultatsammenfatning (fortsat)

### Sammenfatning af indeksscorer

| Indeks | | Total skalascore | Indeksscore | Percentil | 95% Konfidens-interval | Kvalitativ beskrivelse | *SEM* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Verbal Forståelse | VFI | 8 | 68 | 2 | 63-80 | Langt under gennemsnittet | 3,97 |
| Visuo-spatialt | VSI | 18 | 94 | 34 | 86-103 | Gennemsnitligt | 4,97 |
| Ræsonnering | RSI | 19 | 97 | 42 | 90-105 | Gennemsnitligt | 4,24 |
| Arbejdshukommelse | AHI | 10 | 72 | 3 | 67-82 | Noget under gennemsnittet | 4,24 |
| Forarbejdningshastighed | FHI | 18 | 95 | 37 | 87-105 | Gennemsnitligt | 6,00 |
| Hele skalaen IK | HIK | 50 | 79 | 8 | 74-86 | Noget under gennemsnittet | 3,00 |

Konfidensintervaller er baseret på standard målefejl *(SEM)*.

### Indeks- og IK-profil




***Bemærk.*** Lodrette søjler repræsenterer konfidensintervaller

# Ráð – tá næmingar hava torført við innlæringini

- Tillagað bókliga tilfari
- Tak atlit til troyttleika, gev pausur og ikki ov nógv tilfar í senn
- Endurtøkur
- Být læringina sundur í smærri bitar. Gev barninum tíð at sodna tað lærda. Fær ikki ov skjótt víðari.
- Hjálp barninum at knýta “lærings-klumparnir” saman
- Kombinera tað bókliga við tí gerandisliga
- Lær áhugamálini hjá barninum at kenna, og knýt læringina saman við hesum
- Legg strategi fyri, hvørja skúlating barni skal gera heima, heldur enn bara at fylgja heimasetninginum. Samstarva við foreldrini um hetta.
- Set neyv(ari) mál í eini einstakliga læruætlan, og eftirmet javnan, t.d. .3 hvønn mánað, soleiðis at framgongdin kann mátast. **Vís barninum framgongdina, tað ger.**
- Raðfest, í samstarvi við læraratoymi og foreldrini, hvat er mest neyðugt, at barni lærir.
- Nýt hjálparamboð um neyðugt (upplestrarforrit, at foreldur lesa upp fyri barninum, CD-ord, tabellir, systemir, video, youtube o.s.fr.).

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Eksekutivar funktiónir

Funktiónur, ið eru neyðugar, tá ið man skal:

Fara í gongd við eitthvørt

Tá ið man skal loysa eina uppgávu

Tá ið man skal minnast til og nýta eina vegleiðing

Tá ið man skal leggja til rættis (skipa)

Tá ið man skal standa ímóti impulsum

Tá ið man skal eftirmeta arbeiði

Vm.

# Meting av eksekutivum førleikum







sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Funktiónstøði

- Bio-psyko-sosiala modellin: *At einstaklingurin, við sínum fortreytum, virkar í fleiri samanhangum*

- *Niðursett førleikastøði (ein definitión):*

**Ein misjavni millum fortreytir hjá einstaklinginum og krøv frá umhvørvinum**

# Meting av funktiónsstøði (Tilpasningsfærdigheder)



## Profil

**Adaptive Behavior Assessment System, Third Edition · Forælderskema 2**
**Forælderskema 2: Almen**






© Hogrefe Psykologisk Forlag A/S, Virum
hogrefe

## Adaptive færdighedsområder

Adaptive færdighedsområder inden for **det konceptuelle domæne** giver et mere detaljeret billede af barnets fungeren.

- Kommunikationsevnerne, inklusiv at tale, at lytte, samtale og nonverbale kommunikationsevner, er meget lave.
- Barnets funktionelle skolefærdigheder, der omfatter læsning, skrivning og matematik, er lave.
- Barnets evne til at tage individuelle beslutninger, udøve selvkontrol og tage ansvar, når det er passende, er lav.

Adaptive færdighedsområder inden for **det sociale domæne** giver et mere detaljeret billede af barnets fungeren.

- Færdighederne, som kræves for at engagere sig i leg og rekreative aktiviteter, er meget lave.
- Barnets evne til at interagere socialt, initiere og vedligeholde venskaber samt udtrykke og genkende emotioner er under middel.

Adaptive færdighedsområder inden for **det praktiske domæne** bidrager også til et mere detaljeret billede af barnets evner.

- Barnets evne til at fungere i samfundet og udtrykke viden og interesse i aktiviteter uden for hjemmet er lav.
- Barnets funktionsniveau i hjemmet, inklusiv at hjælpe andre med huslige pligter og vedligeholde personlige ejendele, er lavt.
- Sundheds- og sikkerhedsevnerne, som er nødvendige for at beskytte barnets fysiske velbefindende og for at undgå eller tage vare på skader, inklusiv at følge sikkerhedsregler og udvise forsigtighed, når det er nødvendigt, er lave.
- Barnets evne til at udvise egenomsorg, såsom at spise, tage tøj på og tage sig af personlig hygiejne, er meget lav.

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

**Persónligir fortreytir**

- Sosialir førleikar
- Praktiskir førleikar
- Kognitivir førleikar
- Tað kensluliga, andaliga og kropsliga
- …

Vegleiðing og stuðul umframt strategiir, ið minka um misjavnan millum persónligar fortreytir og krøv frá umhvørvinum

**Krøv frá umhvørvinum**

Væntanir, avbjóðingar og annað sum fylgir við fullari luttøku í støðum og virksemi í skúlanum, frítíð, arbeiði og samfelagnum annars

- Vit tosa um persónligir faktorar so sum førleikar, evnir, meistring o.a.

- Vit tosa um umhvørvisfaktorar – tað fysiska rúmi, tey menniskju, ið eru í umhvørvinum o.a.

- Vit tosa um at tillaga undirvísing og annað til einstaklingin, men vit tosa eisini um luttøkumøguleikar og menningarmøguleikar

- Umráðandi er, halda vit, at ikki hugsa um niðursettir kognitivar førleikar sum avmarkingar, men at barnið mennist í sínum tempo, og hevur tørv á, at tey vaksnu rundanum skapa eitt umhvørvi við eyga fyri menningarmøguleikunum hjá barninum.

Tað merkir, at tað er neyðugt finna útav nær krøvini, ið ein setur til barnið í gerandisdegnum eru hóskandi - krøv sum barnið megnar at taka ímóti og handfara

- Ein rættiliga høgur persónur er ikki sum útgangstøði skerdur, men um samfelagið sum persónurin livir í, er innrættað til miðalhøg fólk, vil ein rættiliga høgur ella lágur persónur uppliva avbjóðingar
- Um vit nýta hesa tankagongdina við atliti til næmingar, ið liggja undir miðal ella lægri, kann tað seta nakrar tankar í gongd.
- Um barnið er partur av einum systemi og samfelagð, har ið tað setast høg krøv til tað fakliga kann einstaki næmingurin við øðrvísi fortreytum enn flestu javnaldrar, dragna afturúr, ella má stríðast fyri at fylgja við
- Hetta kann so ávirka barnið neiliga, td. hava ávirkan á motivatión, skapa ótryggleika, ávirka sjálvsmyndina, gera at barnið fær neiligar tankar, og so framvegis


Byrða (Belastning) ið td. kann ávirka sjálvsmyndina
Fortreytir
Ov høg krøv
Miseydnaðar royndir
Neilig ávirkan


Eingin byrða
(Belastningur)
Fortreytir
Hóskandi krøv
Megnar/meistrar
Jalig ávirkan

- Út frá hesari definitiónini um ein misjavna ímillum fortreytir og krøv, kann tað sigast, at um eitt barn út frá Bell kurvini, ið hagfrøðiliga lýsir normalfordeiling, fellur uttanfyri tað ásetta normala innan kognitivir førleikar, ikki merkir tað sama sum, at barnið hevur niðursett funktiónstøði.

- Tá ið skerdir kognitivir førleikar kann hava við sær, at einstaka barnið ikki meistrar tey krøv sum setast av umhvørvinum kann man síggja eitt lægri ella niðursett funktiónstøði.

# Lev Vygotsky

- (1896-1934)
- Sálarfrøðingur
- Sociokulturella teori um kognitiva menningarsálarfrøði



sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING



'For udfordrende'
Zone for nærmste udvikling
'For nemt'
Opgaver løses
uden hjælp
'Passende'
Opgaver løses
med assistance
Opgaver kan ikke løses
selv ikke med assistance

# Urie Bronfenbrenner

- (1917-2005)
- Sálarfrøðingur
- Dynamiska økologiska systemteori um menning og atferð hjá børnum



sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING




sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Samanflætting av vitan

- Kanningarúrslit
- Generel vitan (sálarfrøði, didaktik,  floksleiðsla, sernámsfrøði osv.)
- **Lokal vitan td:**
- Mentan
- Fysiska rúmið
- Tilgongdir til undirvísing
- Tilfar
- Relatiónir
- Dynamikkir
- Osfr.



sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# David Wechsler (1896-1981)

*"Det vi måler med tests, er ikke det tests måler.*

*Det er ikke information, ligheder eller blokmønstre. Disse er kun midler vi bruger for at nå målet.*

*Det intelligenstests virkelig måler er noget, som er mere vigtigt:*

*Vi måler hvordan et individ forstår den verden som omgiver ham/hende og hvordan han/hun håndterer de udfordringer, som dukker op undervejs".*



sernám

NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

- Gita
- Vera uppgevandi
- Spyrja um tey kunnu fara á ves, fáa okkurt at drekka
- Avlesa á mær, hvat rætta svarið er
- Gerast óróligt
- vm.
- Tað sum er altavgerandi er, at barnið skilir vegleiðingina
- Ein kann kanna og leggja í geyma hvussu barnið ger, hvat barnið sigur ella hvat sæst á barninum, tá ið tað gongur væl og tá ið tað gerst truplari

| | |
|---|---|
| **Hvat geri eg, hvat sigi eg og hvussu síggi eg út, tá ið eg megni at luttaka í tímanum** | **Hvat kann lærarin gera fyri at hjálpa mær** |
| *Kropsliga:*<br>- Smílist<br>- Havi eygnasamband<br>- Róligan kropsburð<br>- Gott arbeiðslag<br>- Ágrýtin<br>- ..<br><br>*Samskiftisliga:*<br>- Taki ímóti vegleiðingum<br>- Fylgi vegleiðingum<br>- Seti spurningar<br>- Svari, tá ið lærarin spyr<br>- ..<br><br>*Annað*<br>- Kann arbeiða hugbundin í __ minuttir<br>- ...<br>- ... | - Geva mær stuttar og greiðar vegleiðingar<br>- Kanna um eg havi skilt vegleiðingina<br>- Vísa mær dagin við visuellum amboðum og tosa við meg gjøgnum dagin<br>- Eggja meg at arbeiða saman við øðrum um neyðugt<br>- Tryggja at eg biði um hjálp, um eg havi tørv á tí<br>- Minnast til, at onkuntíð kann eg ikki fylgja við, tá ið tað er larmur<br>- Minnast til at eg gerist ótryggur við ókendar støður<br>- Minnast til at eg havi brúk fyri hjálp at halda skil á mínum tingum<br>- Rós ger meg ordiliga glaðan<br>- ... |

| Hvat geri eg, sigi eg og hvussu síggi eg út, tá ið eg ikki eri ordiliga við í undirvísingini | Hvat merkir hetta/hvat royni eg at siga | Lærarin kann |
|---|---|---|
| - Gangi ímillum borðini<br>- Fari ikki í gongd<br>- Siti og stari og geri einki<br>- Gerist ørkymla/ur, tí at tað skjótt verður fríkorter og eg má skunda mær<br>- Svari ikki, tá ið eg verið spurd/ur<br>- …<br><br><u>Annað</u><br>Eg megni ikki at arbeiða ella gera nakað beint nú, men um eg kann sleppa at tosa við xxx, sum eg kenni væl, kann eg koma aftur um eina løtu, tá ið eg eri grøn/ur | - Eg havi brúk fyri mínari fingraslangu<br>- Spyr meg um eg havi brúk fyri hjálp við uppgávuni<br>- Hjálp mær at fara í gongd td. við at vísa mær eitt dømi<br>- Hjálp mær at minnast til, hvat tað var sum eg skuldi byrja við<br>- Gev mær meira tíð at skriva, tí at eg skrivi ikki so skjótt<br>- Lova mær at fara til ein vaksnan, ið eg kenni væl<br>- Ger tað friðarligt inni<br>- …<br>- … | - Fáa frið inni<br>- Lova barninum at lesa í einari bók/tekna<br>- Avleiða – tosa við barnið um okkurt sum td. kelidjór<br>- Nýta skemt<br>- …<br>- … |

# Brede Børnefælleskaber

**Tankin aftanfyri er:**

- At man ynskir at gera eina *samansmeltan* av praksis frá vanliga- og serøkinum

- Námsfrøðilig amboð og tilgongdir og samstarvsmannagongdir frá serøkinum í øllum flokkinum

- Fokus er á at hava ein sterkan felagsskap

- Har man er tilvitaður um altíð at tosa jaliga við og um børnini

*"Selvom børn har forskellige behov og skal mødes ud fra disse, har alle børn brug for det samme for at kunne lære og trives. Alle børn har brug for forudsigelighed, overblik og et omsorgsfuldt læringsmiljø. I stedet for at støtte enkelte børn med specialpædagogiske metoder, udbredes metoder der understøtter tryghed og forståelse, så det kan gavne alle børnene i klassen"*

sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

# Brede Børnefælleskaber (Søndervangsskolen)

› **Figur. Brede børnefællesskaber**




sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING